## Vísindavøka 29. september 2017

# Um uppkalling eftir navnfromum monnum og kvinnum


*Anfinnur Johansen*

*Føroyamálsdeildin*

*Fróðskaparsetur Føroya*

# Uppkallingarsiðurin at kalla kong og drotning upp

**Er tað kongur, sum verður uppkallaður, skal tað vera 7. drongur á rað – eingin genta ímillum – í einum systkinaflokki. Á sama hátt við gentu, um drotningin varð uppkallað, t.e. 7 gentur á rað í einum systkinaflokki, eingin drongur ímillum. Elsta skriftliga dømi, ið eg havi funnið, er úr kirkjubókini í Sandoyar prestagjaldi 1893-1907, tá ið drongur í Skopun, føddur grækarismessudag í 1898, fær navnið Christian Joensen. Sum viðmerking stendur: "Iflg. Skrivelse fra Hs. Majestet Kongen har denne allernaadigst indvilget i at være Fadder til Barnet, der er den 7de i Ægteskabet fødte Dreng". Kongurin er Christian 9, sum var kongur frá 1863 til 1906.**

**Í 20. øld eru fleiri dømi um uppkalling eftir kongunum Christiani 10. og Fríðriki 9., umframt eftir drotningunum Alexandrinu og Ingrid.**

# Thomas Esbern Frederik Johannesen ~ Alexandra Johannesen f. Klein

1. Johannes Ferdinand, f. 1920
2. Edvin Torleif Solberg, f. 1922
3. Thomas Albin Fridleif, f. 1924
4. Hans Andreas Alexius, f. 1927
5. Joen Magnus Johnhardt Siggert, f. 1930
6. Volmar, f. 1933
7. Christian Vernar, f. 1937

## Joen Theodor Martin Sofus Magnussen ~ Inga Malene Henriette Magnussen, f. Midjord

1. Herdis Marie Louise, f. 1923
2. Hanna Jonine Leona, f. 1924
3. Kitty Poulina, f. 1927
4. Jensa Petrina Andrea, f. 1928
5. Malene Henriette Frederikke, 1930
6. Ida, f. 1931
7. Alexandrine, f. 1934

# **Henry Margeir**, f. 1983

(eftir Heindriki prinsi og Margretu drotning)

Hvussu navnið á tí franska keisaranum, Napoleoni Bonaparte, kom higar til lands, greiðir H. M. Debes frá í bók síni Søgur úr gomlum døgum, Tórshavn 1977, bls. 72-73. Nólsoyar-Páll (1766-1809) gjørdist einkjumaður í 1800. Tvey ár seinni, í 1802, giftist hann upp aftur við Marini Malenu Ziska úr Klaksvík. Í hesi giftu vóru trý børn, tvær døtur og ein sonur.

”Tað var tá í hesi tíðini, at Napoleon Bonaparte fór sigrandi fram gjøgnum Europa, og Napoleon var so góður hjá Nólsoyar Pouli, at fólk tóku til, at hann var heilt vitleysur av Napoleon. Tá ið Marin Malena gekk sum hon gekk og skuldi fara á soppin við øðrum barni, setti hann fyri, at varð tað nú ein sonur, so skuldi hann eita Napoleon. Og tað vildi so til, at tað var ein dóttir. Men Napoleon skuldi so kallast upp, og ætlaði hann tí at kalla hana Napolonia; men hetta vildi prestur ikki. Hann helt, at hetta var líkasum ikki fólkanavn, Napolonia, men hann kundi kalla hana Apolonia, sum kemur frá tí grikska gudinum Apollon, og soleiðis varð hon skírd.”

H.M. Debes sigur harafturat, at tá ið tað ikki eydnaðist Nólsoyar-Pálli at fáa navnið Napoleon til eitt av børnum sínum, fekk hann bróður sín, Jákup Nolsøe, ið var handils-forvaltari, at kalla Napoleon upp. Hann kallaði ein son sín Napoleon Nolsøe (1809-1877), ið gjørdist amtslækni í Føroyum. Mong vóru tey, ið vildu æra hann við at kalla hann upp, og soleiðis kom navnið t.d. til Kaldbaks, Nóls-oyar og Suðuroyar, sigur H.M. Debes.

1. september 1992 vóru teir 46 í Føroyum, ið itu Napoleon. 9 bóru stuttnevnið Poli. 6 vóru tær, ið itu Apolonia.

Karlamagnus + eftirnavn, f. 1933

Kristian Osvald Viderø, f. 1906

Martin Luther Viderø, f. 1901

Gustav Adolf Viderø, f. 1904

Johannes Ewald Viderø, 1892

Morten Luther Hansen, f. 1830 í Miðvági

Morten Luther Hansen, f. 1868 í Nólsoy

Morten Luther Hansen, f. 1875 í Nólsoy

Morten Johan Luterus, f. 1899 á Sandi

Martina Lutheriane Danielsen, f. 1863 í Nólsoy

Lutherus Joensen, f. 1858 í Hósvík

Lutherus Hansen, f. 1871 á Strondum

Lutherus Joensen, f. 1890 í Fuglafirði

# Philip Melanchton (1497-1560)

Peter Melanchton + millum- og eftirnavn, f. 1934

Prestar og læknar hava yvirhøvur staðið høgt í metum millum manna og tessvegna ofta uppkallaðir. Hesir menn vórðu aloftast bert kendir við ættarnavni, ið hevur tókst fólki, ið ikki vóru von við ættarnøvn, sum veruligt fornavn. Tí hava vit við uppkalling fingið fornøvn sum

- Debes
- Eisinberg
- Groth
- Hensar (t.e. Hentze)
- Herup
- Krebs
- Rósing (t.e. Rovsing)
- Schwartz
- Wenningsted
- Winther o.s.fr.

V. U. Hammershaimb (1819-1909)

Hammershaimb Frits + eftirnavn, f. 1930

Ásgrímur Hammershaimb + eftirn., f. 1933

Ernst Wesenberg, prestur á Viðareiði 1866-1871

Ernst Wesenberg + eftirnavn, f. 1935

N. F. S. Grundtvig (1783-1872)

Osmund Grundtvig + eftirnavn, f. 1904

Bernhard Severin Ingemann (1789-1862)

Johan Ingeman + eftirnavn, f. 1931

Peter Wessel Tordenskjold (1690-1720), donsk-norsk sjóhetja

Peter Wessel Tordenskjold + eftirnavn, f. 1930

Peter Willemoes (1783-1808), danskur herflota-yvirmaður

Willemoes + eftirnavn, f. 1916

Hannibal, spanskur herhøvdingi (247-183 f. Kr.)

Daniel Hannibal + eftirnavn, f. 1923

Vilhelm 2 (1859-1941) týskur keisari 1888-1918

Franz Ferdinand (1863-1914) eysturríkskur trúnarvingi, myrdur í Sarajevo 28.06.1914

Vilhelmine Franciska Ferdinand + eftirn., f. 1916

Franklin D. Roosevelt (1882-1945)

Sigurd Roosevelt + eftirnavn, f. 1941

Winston Churchill (1874-1965)

Haakon Churchill + eftirnavn, f. 1942

# Álmanakkanøvn

Ein aldagamal navnasiður aðrastaðni er at kalla barn upp eftir halgimennanavni í álmanakkanum. Halgimennini eru vanliga nevnd í álmanakkanum á deyðadegnum, t.d. hin heilagi Martin úr Tours (316-397), Fraklands tjóðarhalgimenni, sum í álmanakkanum stendur undir 11. november, mortansmessu. Hendan dag í 1483 varð Martin Luther, sum varð borin í heim dagin fyri, doyptur og kallaður upp eftir halgimenninum. Seinni verður uppkallingin eftir álmanakkanavninum fyri føðingardagin. Ein heimskendur maður varð skírdur eftir hesum siði, Napoleon Bonaparte (1769-1821) keisari, sum varð føddur á minningardegi Napoleons pínslarváts úr Alexandria.

29.09.1819 Blasius *Mikael* Simonsen, Koltri

29.09.1819 *Mikel* Kristiansen, Tórshavn

29.09.1819 Elsebeth Susanna *Mikkelina* Niclasdatter, Froðba

29.09.1820 Jon Frederik *Mikael* Joensen, Tórshavn (føddur fríggjadag)

29.09.1821 Johannes *Mikael* Hansen, Tórshavn

**Pauli** er vanligt mansnavn í Føroyum. Navnið *Pauli* er íkomið við uppkalling eftir pálsmessudegi 25. januar.

Í danska álmanakkanum stóð *Pauli omvendelse*.

*Pauli* er latínskt hvørsfalssnið av *Paulus*.

29.05.1828 Joen *Maximinus* Niclassen, Tórshavn

24.10.1828 Christian *Proclus* Christiansen, Tórshavn

03.09.1837 Joen Daniel *Serafias* Olsen, Sørvági

11-03-1840 Berenth *Tallius* Olsen, Miðvági

17.04.1844 Johannes *Anicetus* Johannesen, Kollafirði

25.04.1849 Simon *Evangelist* Thomasen, Skúvoy [Markus evangelist]

09.04.1853 Herman *Procopius* Hermansen, Vestmanna

23.07.1853 Ole *Apollinaris* Justinusen, Hvannasundi

14.02.1855 Jacobine Sophia *Valentina* DanielsenTórshavn

Dagurin 14.02 eitur Valentinus

Severin Thomsen (1866-1922) var lækni í Norðuroyggjum frá november 1891 til mai 1892.

Úr dagbók hjá Severin Thomsen 10.01.1892.

I en lille Bygd, der hedder Helle, har Søen taget alle Bygdens Baade i et Antal af tre. Den ene af de tre Fiskere hedder Samuel; den halvvoxne Dreng, der var med i den lille tremands Baad Nytaarsdags Aften, hedder Elias, og Færingerne excellere i det Hele taget i bibelske Navne. Naar de ikke vælge Navnene derfra, vælges de i Reglen ud af Almanaken, og herved fremkommer det mærkelige Fænomen, at en ret bekjendt Fisker i Thorshavn hedder Venus.

I Almanakken har der maaske ved hans Fødselsdag staaet en eller anden Bemærkning om Planeten Venus; de uskyldige Forældre have vel antaget det for Navnet paa en eller anden Helgen, og Faktum er i al Fald, at Venus lever i bedste Velgaaende og mange Gange har roet for Faktoren fra Thorshavn til Klaksvig. Engang kom en Færing til Faktorens Broder, der var Præst heroppe, og bad om at faa sin Søn døbt ”Johannes Hals”; i Almanakken stod der nemlig saaledes ved Fødselsdagen. Ved nærmere Eftersyn viste det sig, at det var en forkortet Angivelse af SøndagsEvangeliet, der handlede om Johannes den Døbers Halshuggelse.”

28.05.1840 Vilhelmina Christina Himmelina Justesen, Viðareiði

# Takk fyri